

Polar Empress, á Molanum í Havn, er eitt av skipunum hjá Dolphin. Fyritøkan kann fara av knóranum nú. Mynd: Jan Muller/oljan.fo

# Enn eitt seismikkfelag við at fara av knóranum

**Jógvan Hugo Gardar**

10.12.2015 - 10:50

Oljan.fo

Í morgun boðar seismikkfelagið Dolphin frá at tað ikki er eydnast at finna eina loysn á fíggjarligu støðuni hjá felagnum. Vi tí metir fyritøkan at tey nú nærkast skiftirættinum skjótt.

Í boðunum til keypsskálan verður sagt at bæði tað at ongin avtala er gjørd um skuldina í felagnum, samstundis sum støðan í oljumarknaðinum ger at útlitini til nýggjar uppgávur eru avmarkaðar, so er lítið í løtuni sum bendir á at fyritøkan kann halda fram við sínum virksemi.

Dolphin er tann næsta seismikkfyritøkan bara hesa vikuna sum hevur boða frá at støðan er so mikið álvarslig, at tey helst enda í skiftirættinum. Mánadagin gav Polarcus boð um at fyritøkan roynir at finna eina langtíðarloysn við bankar og onnur sum hava lænt teimum pengar. Polarcus gav samstundis boð um at fyritøkan ikki rindar rentur og avdrøg longur.

LES EISINI: Norsk frálandsskip til Føroya

LES EISINI: Seismikkfelag er givið at gjalda rentur og avgjøld